# Lægri prísir bíða

**Føroya Tele sigur seg hava funnið sítt kall og ætlar at svara aftur til íslendsku innrásina. Men Fjarskiftiseftirlitið vil ikki loyva lægri prísum uttan lægri kostnaðarstøði**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Seinastu fjúrtan dagarnir hava vent upp og niður upp á føroyska fjarskiftismarknaðin. Føroya Tele er sundurskilt í fleiri feløg, og Kall er nú vorðið dóttirfelag hjá Vodafone Island. Í mun til Vodafone Island er Føroya Tele eitt lítið felag. Umsetningurin hjá Føroya Tele er helvtina av honum hjá Vodafone Island.
Hjá Føroya Tele eru tey eisini greið yvir, at tað er ein nýggjur dagur í føroyskum fjarskifti.

- Vit eru glað fyri, at kappingin er herd. Tað kemur á ongan hátt óvart á okkum. Tað er heilt natúrligt, sigur Richard Mortensen, stjóri fyri FT Samskifti.

Tann nýggi dagurin á føroyska fjarskiftismarknaðinum fer eisini at merkja Føroya Tele.

- Nú vit hava fingið hendan nýggja bygnaðin, og Kall er vorðin partur av einari stórari fyritøku, so eigur hetta eigur at merkja heilt nýggjar spælireglar. Vit eiga at fáa møguleikar at kappast á meira jøvnum, har vit kunnu prísáseta øðrvísi, sigur Richard Mortensen.

Føroya Tele hevur ynski um at áseta lægri prísir á eitt nú GSM økinum í "byrjanar fasuna", sum tað verður rópt. Tað merkir, at á sumum økjum verður prísurin settur undir kostnaðarstøði. Men tað vil Fjarskiftiseftirlitið ikki ganga við til og vísandi til reglugerðina á økinum.

Er hetta ikki bert ein roynd hjá tykkum nú at virka sum tann lítli parturin, hóast tit framvegis eru ein risi á føroyska marknaðinum?

- Vit kunnu ikki bara at síggja fjarskiftismarknaðin sum eitt lokalt føroyskt øki. Kappingin í framtíðini fer ikki at vera millum Føroya Tele og Kall. Vit eru partur av einari alheimsgerðing, har heilt aðrir partar eru við. Tað er alt ov trongskygt at síggja føroyska marknaðin sum bara Føroya Tele og Kall, sigur Richard Mortensen.

- Hetta eigur eisini at fáa fólk at hugsa nýggjar tankar í sambandi við einskiljingina av Føroya Tele, sigur Richard Mortensen.

### Nýggj produkt og prísir

Stjórin fyri móðirfyritøkuna hjá Kall hevur lovað, at nýggj produkt og tænastur fara at koma fyri dagin á føroyska marknaðinum. Føroya Tele sigur ikki ræðast nýggju kappingina.

- Vit fara at svara aftur beinanvegin. Vit fylgja okkara ætlan við fleiri og betri tænastum, sigur Richard Mortensen.

Hann heldur, at Føroya Tele seinnu árini er nógv broytt, og nú er so gott sum klárt at verða einskilt. Á serliga GSM-økinum metir Richard Mortensen, at tað er møguleiki fyri fleiri kundum. Stjórin fyri Vodafone Island hevur boðað frá, at teir ætla sær Føroya Tele kundar. Tað kann Richard Mortensen væl skilja, men tað verður ikki uttan víðari, at Føroya Tele fer at lata kundarnar fara - men almenna fyritøkan fer at taka kappingina upp, sigur Richard Mortensen.

**FAKTA**

Marknaðarpartur hjá Føroya Tele*:

| | |
|---|---|
| FASTNET | 79% |
| GSM | 77% |
| Internet uppringt | 79% |
| Breiðband | 76% |

*Sambært Føroya Tele og Fjarskifiseftirlitinum.

### Lítla ávirkan

Fjarskiftiseftirlitið er eftirlitsmyndugleiki á økinum. Stjórin fyri stovnin, Jógvan Thomsen, heldur ikki, at tað fer at fer at broyta so nógv, at Kall er vorðið íslendskt dóttirfelag.

- Vit hyggja fyrst og fremst eftir marknaðarparti - og ikki eftir eigaraskara, sigur Jógvan Thomsen.

Hann heldur tað vera sera gleðiligt, at Kall nú hevur fingið ein sterkari eigara, men sum er broytir hetta ikki støðuna nakað stórvegis. Hann roknar ikki við lægri prísum beinanvegin.

- Vit hava tað áseting at virka eftir, at prísirnir ikki kunna vera lægri enn kostnaðarstøðið. Um tað ikki broytist, so verður heldur ikki loyvi til lægri prísir, sigur Jógvan Thomsen við ávísing til útsagnirnar hjá Richard Mortensen um lægri prísir á fartelefon økinum.

- So skjótt tað luktar av prískríggi, so siga vit nei, sigur Jógvan Thomsen.




# Nýtt Føroya Tele

**Gjøgnumskygni og greiður skilnaður millum feløgini skal eyðkenna nýggja bygnaðin hjá Føroya Tele**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Um mánaðarskiftið broytti Føroya Tele skap. Føroyski risin á fjarskiftismarknaðinum er nú sundurskildur í eina konsern við móðirfelag og dóttirfeløgum.

Tey 160 fólkini í nýggja bygninginum í Hoyvík, umframt hini starvsfólkini kring landið, skulu nú hava læstar hurðar, tí feløgini skulu rekast sum vóru tey fullkomiliga hvør sítt.

Richard Mortensen, stjóri fyri P/F FT Samskifti, vísir staðiliga aftur, at tað ikki ber til at hava øll trý feløgini í sama bygningi.

- Tað eru greiðar reglur fyri gjøgnumskygni. Vit hava tí mest gjøgnumskygdu fyritøkuna í Føroyum, sigur Richard Mortensen.

Hann grundar hetta á, at serliga kervisparturin nú selir tænastur til Føroya Tele fyri sama prís og til aðrar veitarar.

- Vit kenna, at hetta fer at geva okkum nógv størri dynamikk og nógv fleiri møguleikar, sigur Richard Mortensen.

### Net, samskifti, varp

Nýggi bygnaðurin hjá Føroya Tele er skipaður sum ein konsern við móðirfelag og dóttirfeløgunum. Sum tað sæst á myndini eitur móðirfelagið Føroya Tele. Har er fíggjardeild, KT-deild og leiðsla. Í felagnum FT NET er alt kervið, t.e. allur infrastrukturin hjá felagnum. FT samskifti er tað felagið, sum fólk fara at samskifta við undir Føroya Tele navninum. Har er fastnetsøla, GSM og internet. Hetta er eisini størsta eindin í felagnum. Televarpið er lítlasysturin í familjuni við sínum tænastum.

Fólk flest fara altso at samskifta við samskiftisfelagið undir navninum Føroya Tele.

- Vit hava ætlað at gjørt hesar broytingarnar í longri tíð. Hetta er eisini ein liður í arbeiðinum at fyrireika einskiljingina av Føroya Tele, sigur Richard Mortensen.



*Mynd: Nýggi bygnaðurin hjá Føroya Tele skilir fyritøkuna í dóttirfeløg hjá P/F Telefonverkið.*

### Alment felag

Stjórin fyri Kall, Bjarni Askham Bjarnason, hevur við útvarpið hjá Kringvarpinum sagt, at hann heldur ikki tað vera nóg mikið bert at sundirskilja Føroya Tele í fleiri feløg, har kervið er eitt felag. Hann vil heldur hava kervið sum eitt almennan stovn. Stjórin fyri Vodafone Island segði í Sosialinum í gjár, at hann ikki metir tað vera alneyðugt, at felagið er alment - men tað verða settar greiðar treytir.

Jógvan Thomsen, stjóri fyri Fjarskiftiseftirlitið, heldur tað vera eitt stórt framstig, at Føroya Tele nú er sundurskilt í fleiri feløg. Um Føroya Tele eftir ætlan verður einskilt, so verður tað upp til politiska myndugleikan at gera av, um Føroya Tele framvegis skal umsita kervið ella eitt annað felag, alment ella privat, skal umsita kervið.